Lagt til rættis: Olav Schneider



# Reinsa oyru, vaksinera og AVLÍVA DJÓR



**FRENSAR** VERÐA GELDIR, HUNDAR **VAKSINERAÐIR,** TENN OG OYRU HJÁ **SMÁDJÓRUM** VERÐA REINSAÐ, OG DJÓR VERÐA **AVLÍVAÐ**. **OLAV SCHNEIDER** HEVUR VITJAÐ Á **DJÓRALÆKNASTOVUNI**

Á klinikkini hjá Lars og Signari í Eysturbýnum í Havn fara fólk og djór um dyrnar allan dagin. Teir báðir djóralæknarnir hava nógv at gera. Teir taka sær av øllum djórum frá dvørg-hamstarum til Newfound-lendarar, sum viga 100 kg.

Hundar og frensar verða geldir. Kettur, hamstarar, kaninir, hundar, marsvín og onnur smádjór verða viðgjørd fyri ymsar sjúkur. Hundar verða vaksineraðir, og kettur og hundar, sum skulu av landinum, fáa eina røð av vaksinatiónum og eitt serligt vaksinatiónspass – tað krevja myndugleikarnir.

Brotnar mjadnar og brotin bein verða sett saman aftur, og ormaviðgerð verður givin.

Hjá øðrum smádjórum verða tenn og oyru reinsað og neglirnar kliptar.

Fólk koma við djórum, sum skulu kannast fyri okkurt álvarsligt t.d. krabba. Djórini verða kannað í røntgen, skannara ella við ultraljóði, og blóðroyndir verða tiknar. Onkur teirra koma ikki út aftur úr klinikkini á lívi.

Ofta koma fólk tey tungu spor fyri at fáa djór síni avlívað.

Lars og Signar ferðast um alt landið. Sum oftast fara teir út til neyt og ross, sum av góðum grundum ikki kunnu fáast á klinikkina. Teir kanna djórini, viðgera tey og geva heilivág. Í dag fækkast neytafjósini, so tað eru mest tey stóru fjósini, sum teir vitja. Teir fara sjáldan út til seyð.



*Teir kanna, um beinið á hundinum er brotið*



*Ein stórur partur av arbeiðinum á klinikkini er telefonráðgeving. Sambandið við seyðabøndur og neytabøndur er fyri tað mesta ígjøgnum telefonina. Næstan øll ráðgeving, sum hevur við seyð at gera, verður givin á henda hátt t.d. ráðgeving viðvíkjandi heilivágsviðgerð, og tá seyðurin lembur. Nógv fólk annars, sum hava húsdjór, ringja fyri at fáa ráðgeving.*

